Lýsingin um ruskposarnar í Havn er:

Beinleiðis ósonn

-og harvið ólóglig

Renovatiónsmenninir í Havn hava ikki longur ein nýggjan ruskposa við sær í býti við tann, teir fara av stað við.

Í staðni skulu fólk nú sjálvi keypa sín ruskposa í handlinum fyri 10,75.

Í lýsing frá brennistøðini á Sandvíkarhjalla, sum stóð í Dimmalætting leygardagin, verður sagt, at brennistøðin er skorin niður á næstu fíggjarætlan hjá kommununi, og tí er neyðugt við eini nýggjari skipan.

Men so verður haraftrat sagt í somu lýsing, at gerandisdagurin gerst ikki dýrari fyri "miðal"!! borgaran (hvør hann so enn er), orsaka av hesum brúkaragjaldi. Sagt verður, at tann árligi skatturin, ið fíggjar brennistøðina, minkar við umleið 4 milliónum nú.

Av lýsingini fær ein ta fatan, at hesar 10,75, sum hvør posi kostar, kann fíggja nevndu fýra milliónir, sum brennistøðin skal spara. Men hetta er bert ikki so.

Siga vit, at 4.000 húsarhald við hvør sínum posa fyri 9,00 kr. (tá handisvinningurin er farin av) gevur 28.000 krónur um vikuna ella slaka hálva aðru millión, er eitt fitt lop eftrir til tær áðurnevndu fýra milliónirnar. Við øðrum orðum er hetta brúkaragjaldið bert ein lítil partur av samlaðu sparingini.

Minni skattur?

Brúkaragjald, men minni skattur, stendur í lýsingini. Hetta er ikki bert ósakligt men beinleiðis ósatt. Skattaprosentið í Havn er í løtuni 14,4 og tað verður tað eisini næsta ár. Tí fer skatturin ikki niður, hóast brúkaragjald kemur í gildi.



Talan er um eina útreiðsluøking uttan at skatturin verður minni, sum lýsingin annars vil vera við, skrivar Tórfinn Smith, býráðslimur



§ 11. Tá vøra ella tænasta verður boðin út, er ikki loyvt at nýta rangar, villleiðandi ella ófullfiggjaðar upplýsingar, sum eru egnaðir at ávirka eftirspurningin.

Lýsingin stríðir ímóti grein 11 í løgtingslógini um príseftirlit

Brúkaragjaldið merkir tí eina beinleiðis útreiðsluøking hjá hvørjum húsarhaldið upp á millum 5 og 600 krónur um árið.

Ólógligt at lúgva í lýsing

Sambært grein 11 í løgtingslóg um príseftirlit er ikki loyvt at bera fram rangar, villeiðandi ella ófullfíggjaðar upplýsingar í lýsingum. Eg vil tí heita á Prísráðið um at taka málið upp viðvíkjandi nevndu lýsing vísandi til omanfyri nevndu grein.

Ein bjarnatænasta

Tað kann altíð kjakast um tað er beint við brúkaragjaldi ella ikki, men í hesum førinum beri eg stórliga ótta fyri, at brennistøðin/býráðið er á skeivari leið, og at talan heldur verður um eina bjarnatænastu.

Ein eykarokning upp á 5 - 600 krónur er eisini eitt slag av pengum hjá fólki, har pengar frammnanundan ikki eru til avlops.

Tí er vandi fyri, at fólk finna sær aðrar loysnir at sleppa sær av við ruskið. Loysnir, sum eg als ikki vil mæla til, og sum ikki tæna umhvørvinum. Og líka lítið aðalmálinum hjá brennistøðini, sum sambært lýsingini sigst vera: Eitt ruddiligt og reint umhvørvi.

Brúkaragjaldið, sum nú er sett í verk, kann hava við sær, at brennistøðin missir pengar, heldur enn hon økir um inntøkurnar.

Ein bíttislig skipan við eina eykarokning til havnafólk, sum samstundis kann hótta umhvørvið, borðreidd við ósakligari og ósannari lýsing.

Tórfinn Smith

XEROX XEROX XEROX XEROX XEROX


INNBJÓÐING

Aftur í ár bjóða **P/f Petersen & Guttesen** og **Rank Xerox A/S** tygum á framsýning í hølum okkara í Stiðjagøtu 11 í Tórshavn hesar dagar:

Mikudagin 11., hósdagin 12. og *fríggjadagin 13. september frá kl. 9.00 til 18.00*
og *leygardagin tann 14. september frá kl. 9.00 til 14.00*

Á framsýningini verða fleiri av nýggjastu skrivstovutólunum frá **Rank Xerox** at síggja.

Tað vildi frøtt okkum at sæð tygum og/ella umboð fyri virkið/stovn tygara á framsýningini.



INNBJÓÐING

XEROX XEROX XEROX XEROX XEROX

Urtagarðs-arbeið

Nýanlegg, viðlikahald, sláa grasvøllir, lúka og rudda. Vit leggja eisini flisar á túnið ella rudda upp í tí misrøkta urtagarðinum og mangt annað. Tilboð verður givið. Uppgávur viðvíkjandi húsi og urtagarði kunnu vit sum oftast eisini átaka okkum. Ring og spyr.

Símun Dalsgaard
Boðanesgøta
188 Hoyvík
Tlf. 15478